# Føroysk skúlabørn duga sera illa at lesa

**Tað er niðurstøðan í PISA undankanningini, har lesiførleikin hjá føroyskum skúlabørnum var kannaður. Føroyar var partur av kanning har 32 lond luttóku, og endaðu næstaftast**

PISA-KANNING
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Petur Petersen greiðir frá skelkandi úrslitunum í kanningini.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Næmingarnir, sum luttóku í kanningini 7. september 2005, eru í dag 16 ára gamlir og ganga í 10. flokki og fyrsta árið í miðnámsskúlunum. Í mun til kanningarnar, sum gjørdar eru í hinum londunum, so eru føroysku skúlabørnini eitt stað ímillum tríggjar og fimm mánaðir eldri enn hinir næmingarnir. Hetta tí ,at kanningarnar, sum gjørdar eru aðrastaðni eru gjørdar við skúlaárslok, meðan kanningin her á landi, var gjørd við skúlaársbyrjan - 7. september í 2005 - og kann tað, sum so nógv annað, hava havt ávirkan á endaliga úrslitið.

### Bert betri enn Brasil

Tað var Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, og Petur Petersen, aðalstjóri í Mentamálaráðnum, sum greiddu frá kanningini. – Kanningini fer at skapa eitt stórt kjak í Føroyum um føroyska fólkaskúlan. Men tað er mín vón, at hetta verður eitt konstruktivt kjak, soleiðis at vit fáa okkurt skilagott burtur úr, segði landsstýrismaðurin.

Av 32 londum eru Føroyar næstaftast í kanningini, har einans Brasil var verri fyri enn vit. Samanbera vit okkum við Norðurlond, so eru vit øgiliga nógv verri fyri enn tey.

### Finland fremst

Sambært kanningini, so er tað í Finlandi, at næmingarnir eru best fyri. Jóhannes Eli Iversen, fyrrverandi formaður í Føroya Lærarafelag, var við á tíðindafundinum, og hann segði, at finska skúlaverki var munandi øðrvísi enn tað føroyska, og at disiplinin var størsti munurin. - Eg havi vitjað á einum finskum skúla, og har valdaði ein heilt onnur virðing og disiplin fyri skúlanum, enn tað ger her. Hetta á ein positivan hátt, væl at merkja. Eisini er finski skúlin nógv betri fyri hvat undirvísingartilfari viðvíkur, segði Jóhannes Eli Iversen.

### Mamman størri týdning enn pápin

Í kanningini kom fram, at bakgrund foreldrana hevur stóran týdning fyri førleikan hjá næminginum. Hava foreldrini onga útbúgving, so er tann næmingurin nógv verri fyri, enn næmingurin har annað foreldur hevur útbúgving. Í hesum samanhangi varð eisini víst á, at mamman hevur størri týdning fyri barnið enn hvat pápin hevur.

### Fáir skúlar halda støðið

At føroysku fólkaskúlarnir ikki liva upp til vónirnar, er ongin ivi um, eftir at kanningin staðfesti, at vit bert eru eitt vet betri enn Brasil, hvat lestrarførleikanum viðvíkur. Men, at tað bert er ein føroyskur skúli, sum megnar at halda seg omanfyri tað, sum mett verður at vera nøktandi, er sera vánaligt.

Ein føroyskur skúli helt seg omanfyri 500, sum var tað talið, sum var miðal fyri eitt nøktandi úrslit. Nakrir heilt fáir skúlar lógu beint undir, meðan restin lá langt niðanfyri. Hetta var galdandi, tá talan var um lestrarførleikan, og úrslitið var nakað tað sama, tá talan var um støddfrøði og náttúrufak.

Í roynd og veru er støðan í fólkaskúlunum so mikið ring, at bert helvtin av næmingunum eru skikkaðir at fara undir eina miðnámsútbúgving, vísti kanningin.

### Helvtin keðir seg

Helmingurin av føroysku skúlabørnunum keða seg í skúlanum. Hetta var ein onnur av niðurstøðunum í kanningini. Í samband vit hetta varð millum annað víst á, at ov nógv orka í føroyska fólkaskúlanum fer uppá tann veika næmingin, síðani heildina og síðst í røðini kemur tann dugniliga næmingurin.

Ein beinleiðis avleiðing av hesum er, at hjá føroyska næminginum, loysir tað seg ikki at nýta meiri enn tíma lesing til skúlating um vikuna. Tað vísir seg nevniliga, at tann næmingurin, sum brúkar tríggjar tímar, er so lítið betri fyri, enn tann, sum brúkar ein tíma, tí tann tíðin hann brúkar eyka uppá skúlating, ikki kemur til sín rætt í skúlanum.




### Landsstýrismaðurin skelkaður

Jógvan á Lakjuni er útbúgvin lærari, og hann segði vita, at støðan í skúlunum ikki var góð. – Men eg má siga sum er, at eg var skelkaður, tá eg sá úrslitið av kanningini, greiðir landsstýrismaðurin frá.

Á fundinum varð sagt, at í fyrstu atløgu eigur at verða umrátt, hvørt lærarafórleikin er nøktandi,og hvørt undirvísingartilfarið í øllum lærugreinum í Føroya lutfalsliga smáu skúlum er nøktandi.

Her var eisini nomið við, at uppgávan hjá lærarunum í alt ov stóran mun, er at uppdraga næmingarnar, tí teir snøgt sagt ikki eru klárir til tað, skúlin eigur at kunna krevja av teimum, og tað gongur út yvir undirvísingina.

Um vánaligu úrslitini eru tengd at teimum øðrvísi umstøðunum rundan um kanningina, fáa vit ikki svar uppá, fyrr enn úrslitið frá PISA2006 eru greinaðar. Úrslitið av hesum verður almannakunngjørt í desember 2007.

# Fólkaskúlin dumpaður

**Í Pisa-undankanningini dumpar føroyski fólkaskúlin við einum bresti. Úrslitini eru so vánalig, at bert Brasilia er betur fyri í lesing, og vit liggja sum heild nógv lægri enn hini Norðurlondini.**

*Rigmor Dam*
*rigmor@skulin.fo*

Føroysku næmingarnir klára seg sera illa í náttúrufakunum, men eisini lesing og støddfrøði eru úrslitini vánalig. Helvtin av føroysku næmingunum sigur seg keða seg í skúlanum, og ein 1/3 av næmingunum halda, at ov nógvur ófriður er í tímunum.

Helvtin av næmingunum eru so illa fyri, at teir eru ikki egnaðir til at taka eina miðnámsútbúgving. Hetta tal var 18 % í Danmark í PISA2000.

### Munur á skúlunum

Vit prenta her partar av samandráttinum av Pisa-undankanningini, sum sigur, at í Føroyum eru týðandi munir á miðalstøðinum fyri skúlarnar. Smærri munir eru í støddfrøði, meðan størsti munurin er í náttúrufaki. Í lesing og støddfrøði bendir nógv á, at lærarafórleikin eins og dygdin á undirvísingartilfari ikki altíð eru fullgóð, og at ein partur av næmingunum tí ikki fær fullgóða avbjóðing í lærugreinunum.

### Familjan týdning

Fakligu testúrslitini hava samband við eina røð av næminga- og foreldrabundnum viðurskiftum av sosialum, mentanarligum og áhugatengdum slagi. Hetta er kannað í sambandi við lesiúrslitini. Útbúgvingarstøðið hjá bæði mammuni og pápanum spæla ein týðandi leiklut, meðan tal av systkjum er uttan týdning. Afturat útbúgvingarstøðinum eru ávís viðurskifti heima hjá næmingunum, ið eru av týdningi fyri lesistøðið hjá viðkomandi næmingum. Størsta mun ger foreldranna mentanarliga samskifti, men eisini tað útbúgvingarliga tilfeingið heima hjá næminginum, materiella ríkidømið hjá familjuni og mentanarligar ognir tykjast at ávirka á ymsan hátt. Mentanarliga virksemið hjá næminginum sjálvum og hvussu nógva tíð hann brúkar til heimaarbeiði hava eisini ávirkan.

### Trivnaður og sosial sambond

Tá hugt verður eftir næmingatrivnaði og teimum sosialu sambondunum, eru sera fáir næmingar, sum kenna seg uttan fyri hópin, og parturin av næmingum, sum kenna seg uttanfyri, er størstur millum teir næmingar, sum duga illa at lesa. Ein góður helmingur av føroysku næmingunum sigur seg keða seg í skúlanum, og tað er heldur meiri, enn í Danmark. Einki reglubundið samband er ímillum keðsemi og lesistøði í Føroyum.

Av føroysku næmingunum halda 11%, at larmur og órógv eru í øllum tímunum, meðan 23% halda, at larmur og órógv eru í teimum flestu tímunum. Talið á næmingum, sum uppliva órógv er tó minni í Føroyum enn í Danmark. Lutfalsliga nógvur larmur og órógv hava samband við eitt lágt úrslit í lesing, og tað sama er at síggja í øllum øðrum londum í PISA.

### Frítíð og heimaarbeiði

Á frítíðarøkinum er galdandi, at føroyskir næmingar eru eyðsýnt minni ídnir at gera heimaarbeiði í lærugreininum føroyskum enn danskir næmingar eru í lærugreinini donskum. Eisini er tað so, at dreingir brúka munandi minni tíð til heimaarbeiði enn gentur. Teir næmingar, sum als ikki brúka tíð upp á heimaarbeiði í føroyskum, hava eisini tey vánaligastu lesiúrslitini í PISA. Sama ger seg galdandi í støddfrøði – har kortini ongar samanberingar eru gjørdar við PISA-úrslit, tí allir næmingarnir vórðu ikki kannaðir í støddfrøði. Í náttúrufakunum er talan um, at meira enn ein helvt av føroysku næmingunum ikki gera heimaarbeiði, ein sera týðiligur munur, um samanborið verður við Danmark. Verður hugt eftir kynunum er myndin ein onnur enn í hinum báðum lærugreinini, tí í náttúrufakunum eru dreingirnir ídnari enn genturnar at gera heimaarbeiði.

### Lesivanar

Føroyskir næmingar eru munandi minni lesivirknir í frítíðini samanborið við danskar næmingar. Eins og í øðrum londum eru dreingirnir minni lesivirknir enn genturnar. Viðvíkjandi hugi til at lesa, mótsett tí at skula lesa, er tað galdandi, at hugalesing er sjáldnari í Føroyum enn í Danmark, og vantandi hugurin at lesa er serstakliga galdandi fyri dreingirnar. Tá hugt verður eftir lesihuga, er eitt sterkt positivt samband ímillum hug og góð lesiúrslit í PISA. At lesa fagrar bókmentir er sjáldnari í Føroyum enn í Danmark. Smá 35% av føroysku næmingunum lesa ikki fagrar bókmentir ímóti 20% av teimum donsku, og skeivleikin millum kynini ger seg aftur galdandi her, eins og samband er við PISA lesiførleika.

## FAKTA

32 lond vóru við í fyrsta PISA-umfarinum,"PISA2000", sum við nøkrum smærri tillagingum er brúkt í PISA-Føroyum 2005.

Í PISA-Føroyum 2005 luttóku 594 næmingar á 10. floksstigi ella í miðnámsútbúgvingum úr 24 skúlum. Felags fyri hesar næmingar er eitt nú, at teir, fram til juni 2005, gingu í 9. flokki í føroyskum skúlum.